# Útróðrarmenn í Suðuroy sleppa nú undan a kryvja fiskin umborð

**Fiskavirking í Suðuroy er farin undir eitt tiltak sum kann gerast bjargingin hjá útróðrinum**

ÚTRÓÐRARFISKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta verður bjargingin hjá útróðrarflotanum.

Mannbjørn Solmunde á Tvøroyri er ein av teimum mongu útróðrarmonnunum, sum eru avbera fegnir um eitt nýtt tiltak hjá Fiskavirking í Suðuroy.

Fiskavirking í Suðuroy hevur nú tikið stig til at taka ímóti ókruvdum útróðrarfiski.

Tað merkir, at útróðrarmenninir skulu bara blóðga fiskin niður í rennandi ísvatn, so verður hann avreiddur ókruvdur.

Tað eru bæði Fiskavirking í Vági og Fiskavirking á Tvøroyri, sum nú taka ímóti ókruvdum útróðrarfiski.

Tá ið fiskurin so er avreiddur, verður hann kruvdur á landi.

Hetta er ein nýggj leið í føroyskari fiskivinnu, sum Fiskavirking nú er farin í holt við í samráð við útróðrarmenninar.

So vitt vit vita, eru onkrar royndir gjørdar við at taka ímóti ókruvdum toski, men tað er dottið niðurfyri aftur. Við upsa er hetta neyvan roynt áður.

Hinvegin hava íslendingar tikið ímóti ókruvdum fiski í fleiri ár við góðum úrsliti.



*Nýggjar tíðiri føroyskari fiskivinnu. Her standa menn hjá Fiskavirking á Tvøroyri og kryvja upsa frá útróðrarbátum.Teir, sum hyggja at, eru, frá vinstru, Mannbjørn Solmunde, útróðrarmaður, Bjarni Hansen, virskileiðari á Fiskavirking á Tvøroyri og Petur Johannesen, virkisleiðari hjá Fiskavirking í Vági. Kryvjararnir báðir eru Michael Borgardal, v.m. og Sonni Petersen*

### Betri fisk og betri prís

– Hetta er ein roynd, sum tænir fleiri endamálum, siga Petur Johannesen, virkisleiðari hjá Fiskavirking í Vági og Bjarni Hansen, virkisleiðari hjá Fiskavirking á Tvøroyri.

Teir siga at í fyrsta lagi er hetta ein roynd at fáa fiskin so feskan og góðan á land sum gjørligt.

– Hetta er ein roynd at gagnnýta tann spillfeska útróðrarfiskin betur og at fáa ein serligan prís fyri hann.

– Tað skuldi so aftur avspeglast bæði í prísinum og á avreiðingarprísinum.

Fiskavirking hevur roynt hesa skipanina í nakrar dagar.

– Tað er týðiligt, at fiskurin er sera góður, sum útróðrarbátarnir koma við og okkara avbjóðing verður nú at fáa ein góðan prís fyri fiskin á marknaðinum, siga virkisleiðararnir í Vági og á Tvøroyri.

### Allur fiskurin til høldar

Men kemur fiskurin ókruvdur á land, ber eisini til at fáa allan fiskin til høldar. Sostatt ber til at taka bæði livur og annan innvøl, umframt rogn, sil, sum síðani kunnu avreiðast víðari.

Fyribils hevur Fiskavirking í Suðuroy bara tikið livrina frá, sum síðani er seld til livravirkið á Eiði. Men tey vænta at hitt kemur seinni.

Fiskavirking hevur fingið eitt serligt kryvjingarborð, har tað ber til at skilja livur, rogn, sil, sundmagar, garnar og annað.

Í løtuni er bara ikki so nógv livur í fiskinum. Tað er ikki meiri enn 1,8%-2% av livur í fiskinum í dag, har tað átti at verið eini 8% um hesa tíðina. Men tá ið livurin er best, kemur hon upp á 10%.

Tað tað er so lítil livur í fiskinum nú, taka teir sum eitt tekin um, at fiskurin fær ov lítið at eta.

Teir báðir virkisleiðararnir siga, at enn hevur lítil toskur verið at fáa, so tað er mest upsa, sum teir hava tikið ímóti ókruvdum.

### Bjargar útróðrarflotanum

Mannbjørn Solmunde, útróðrarmaður fegnast stórliga um hetta tiltakið hjá Fiskavirking. – Hetta er eitt, sum útróðrarmenn hava bíðað eftir í fleiri ár og hetta kann vera tað, sum bjargar okkum, sigur hann.

– Hetta er einasti glotti, útróðrarmenn hava fyri stavn, leggur hann afturat. Hann sigur, at tað hevur stóran tydning at sleppa undan at kryvja umborð.

– Er nógv at fáa, ber oftani illa til at kryvja undan. So mugu bátarnir leggja mitt um dagin at kryvja til langt út á kvøldið ístaðin fyri at fiska.

– Nú kemur fiskurin beinanvegin niður í ísvatn hagar hann verður blóðgaður og so fær hann frið. Og tað sigur seg sjálvt, at tann fiskurin er ikki líka góður, sum tann, ið kann avreiðast beinanvegin.

– Kann hesin fiskurin so harafturat seljast sum ein heilt serlig vøra, skal tað nokk eisini, síggjast aftur í prísinum sum frálíður.

### Fáa meiri burturúr

Men nú útróðrarmenn sleppa undan at kryvja umborð, kunnu útróðrarbátarnir klára seg við færri monnum. Við teimum smæstu bátunum er bara ein maður við, men við teimum, sum eru eitt sindur størri, kunnu teir nú vera ein ella tveir mans við og sostatt fáa eina hampuliga úrtøku, serliga tá ið prísurin er lágur.

Tá ið teir skuldu kryvja umborð, máttu teir kanska vera fýra mans umborð og tá bleiv so lítið í part.

– Sostatt er hetta ein skipan, sum skuldi kunna komið bæði útróðrarmonnum og virkinum til góðar, siga bæði virkisleiðararnir á Fiskavirking og útóðrarmaðurin.

– Hevði tað eisini bøtt um møguleikarnar hjá livravirkinum á Eiði at fingið ráværu, var vinningurin tvífaldur.

– Hetta er eitt tiltak, vit halda at vit eru noydd til. Tað nyttar ikki bara at gremja seg um kappingina frá kineserum. Hon hvørvur ikki, hvussu vit so grenja, tí er tað neyðugt at vit sjálvi gera okkurt, leggja teir afturat.

# Hava bíðað í fleiri ár eftir sunnudegnum

**Men nú kemur hann, lovar Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

ÚTRÓÐUR
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Útróðrarmenn eru nú rættiliga ótolnir eftir at politikararnir halda síni lyfti.

– Í fleiri ár hava politikararnir lovað okkum, sum hava útróðrarbátar undir 15 tons, at vit eisini skulu sleppa at rógva út sunnudag, sigur Mannbjørn Solmunde, útróðrarmaður á Tvøroyri.



*– Tað er nógv fyri at noyðast ganga og mala ímillum húsini ístaðin fyri at sleppa til arbeiðis, tá ið øll onnur kunnu arbeiða, sigur Mannbjørn Solmunde, útróðrarmaður*

Men tað sær ikki út til at tað blívur til nakað.

Støðan er tann, at útróðrarmenn við bátum undir 15 tons, hava ikki loyvi at rógva út sunnudag.

– Tú kanst sparka bólt og tú kanst selja rundstykki sunnudagar. Tú kanst eisini fiska akkurát, sum tú vilt sunnudag - bara báturin er størri enn 15 tons.

Mannbjørn Solmunde sigur, at hetta órógvar útróðrarmenn í ólukkumát. Hann nevnir Norðhavið í ár, sum eitt dømi.

– Tað vísti seg, at sjey av átta sunnudøgum, vit vóru á Norðhavinum, var fínasta veður. Tá var tað svárt at noyðast at ganga og mala ímillum húsini á Eiði, heldur enn at sleppa til útróðrar, serliga tá ið tað annars viðraði ógvuliga illa, sigur hann.

– Tað vóru nógvur bátar, sum ikki høvdu meiri enn átta dagar tilsamans alla Norðahavstíðina, so tað er skilligt, hvussu illa tað kom við, at vit máttu liggja bundnir í fínasta veðri, bara tí at tað var sunnudagur.

### Nú kemur hann

Men nú verður tað, at útróðrarbátar undir 15 tons eisini sleppa at rógva út sunnudagar.

Tað lovar Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

Hann sigur, at forboðið ímóti at fiska sunnudag, stendur í eini umfatandi kunngerð um fiskiskapin á landleiðini.

Ætlanin er at broyta alla kunngerðina og í tí sambandi verður bannið ímóti at fiska sunnudag, tikið av. Landsstýrismaðurin sigur, at kunngerðin er komin ígjøgnum alla mylnuna og hon hevur eisini verið fyri í landssýrinum.

– Innanfyri 14 dagar, ella so verður hon klár at lýsa og so verður loyvt hjá øllum at fiska sunnudag, sigur Bjørn Kalsø.